# Bjørt fer úr Tinganesi

**Kunningarráðgevin á Løgmansskrivstovuni, Bjørt Samuelsen, hevur sagt seg úr starvi. Høvuðsorsøkin til uppsøgnina er, at hon ikki ynskir at vera partur av valstríðnum til løgtingsvalið**

STARV
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Hugtakið »spindoktari« ella »spunasmiður«, sum tað verður rópt á føroyskum, hevur í nógv ár verið kent frá serliga amerikanskum og enskum politikki. Seinnu árini er tað vorðið alt meiri vanligt í flest øðrum londum, har fyritreytirnar fyri at standa seg í politikki í sera stóran mun eru treytaðar av, at politikarin stendur seg í fjølmiðlunum.

Talan er sostatt um at vera kunningarráðgevi og fjølmiðlaráðgevi, ið hevur sum fremstu uppgávu at hjálpa einum politikara – oftani einum ráðharra ella leiðandi politikara – so hesin tekur seg væl út í fjølmiðlunun.

Serliga undir eini politiskari kreppu, herferð ella undir einum valstríði hevur tað stóran týdning fyri politikarar at hava góðar fjølmiðlaráðgevarar.

Fyrstu ferð hugtakið »spunasmiður« kom inn í føroyskan politikk, var, tá Jóannes Eidesgaard í sínum fyrsta ári sum løgmaður, gjørdi av at seta ein kunningarráðgeva. Valið fall á Bjørt Samuelsen, ið er útbúgvin journalistur og sum hevur fleiri ára royndir frá bæði norskum og føroyskum fjølmiðlum.

Bjørt Samuelsen hevur nú sagt seg úr hesum starvinum í Tinganesi. Høvuðsorsøkin er, at hon ikki ynskir at gerast partur av valstríðnum, ið so smátt er við at byrja. Val verður í seinasta lagi 19. januar komandi ár, og hetta merkir, at valið skal útskrivast seks vikur frammanundan, og tað er fyrst í desember. Av tí at talan eisini er um eitt tíðaravmarkað starv, hevur Bjørt Samuelsen valt at siga farvæl nú.

– Hetta er ikki eitt politiskt sett starv, men av tí, at tað er tíðararmarkað til stutt eftir valið, hevur tað eitt politiskt stempul. Eg vænti, at innihaldið í starvinum fer at broytast nógv, nú vit nærkast einum vali, og eg ynski ikki at vera partur av einum valstríði, sigur Bjørt Samuelsen, sum varð sett at byggja upp eina kunningardeild í Tinganesi og at røkja sambandið við fjølmiðlarnar.

Fyribils ætlar Bjørt Samuelsen sær ikki í nakað annað starv, men fer at arbeiða sum freelansari.



*Í næsta mánaði steðgar Bjørt Samuelsen sum kunningarráðgevi hjá løgmanni og umsitingini í Tinganesi*

*Mynd: Per á Hædd*

**FAKTA**

Bjørt Samuelsen er ein av stigtakarunum til kvinnuportalin kveik.fo. Hon er útbúgvin Cand. Brom (matvøruverkfrøðingur) í Danmark og hevur journalistútbúgving úr Noreg. Hevur starvast á Aftenposten, Forbrukerrapporten og NRK-tv. Flutti í 2000 til Føroyar saman við manni og tveimum børnum og hevur arbeitt í útvarpi, sjónvarpi og sum freelansari. Hevur eisini undirvíst á Fróðskaparsetrinum í granskingamiðlan.

# Útlendsk tíðindafólk á vitjan í Føroyum

**Hóast Bill Clinton útsetti vitjanina í Føroyum, eru fleiri útlendsk tíðindafólk, ið ætlaðu sær at siga frá vitjani hjá fyrrverandi amerikanska forsetanum, kortini komin hendanvegin**

SUMMAR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Í gjár skuldi Bill Clinton hava staðið á palli í Norðurlandahúsinum við fyrilestri, men vitjanin varð útsett av persónligum ávum. Gitt hevur verið, hvørjar persónligar orsøkir, talan er um, og ein av teimum er, at tað skuldi vera kona hansara, Hillary Clinton, sum hevur brúk fyri stuðuli frá manni sínum í royndunum at gerast valevni hjá demokratunum til forsetavalið næsta ár.

Tað er Vinnuhúsið, sum hevur bjóðað Bill Clinton og svinanum Hans Blix Hóast til Føroya. Ein riðil av útlendskum tíðindafólkum høvdu boðað frá, at tey vildu koma hendanvegin at siga frá vitjanini.

Átta av teimum 23 útlendsku tíðindafólkunum eru komin til Føroya, hóast vitjanin hjá Bill Clinton er útsett. Hesi átta tíðindafólkini arbeiða fyri altjóða tíðindastovuna Accosiated Press, kinesiskt sjónvarp og polskar fjølmiðlar.

Í greinum og sjónvarpsinnsløgum ætla tey millum annað at siga frá kanningunum í veðurlagsbroytingum, sum Bogi Hansen á Fiskirannsóknarstovuni stendur fyri, hvussu alnótin og nýggj tøkni hevur broytt dagligdagin hjá Føroyingum, og um Føroyar sum ferðamannaland.

Accosiated Press er ein av heimsins elstu tíðindastovum og ber tíðindi á fimm ymiskum málum til 1700 avísir og tíðarrit í 121 londum. Eisini ein sjónvarpsfotografur hjá AP er við á ferðini, og hon ger tilfar, sum verður sent 200 ymiskum sjónvarpsstøðum kring heimin, skrivar Vinnuhúsið í tíðindaskrivi.

Trý av tíðindafólkunum eru frá kinesiska sjónvarpinum NTDTV, sum røkkur út til 200 milliónir kinesarar.

Tey átta tíðindafólkini eru í dag ein túr við Norðlýsinum runt Nólsoynna og fara av aftur landinum í kvøld og í morgin.

Tað er Tórun Ellingsgaard, journalistur, ið samskipar pr-arbeiðið í sambandi við vitjanina hjá Clinton, og sum tekur sær av tíðindafólkunum, meðan tey eru í Føroyum.

Enn er ongin dagur ásettur fyri vitjanina hjá Bill Clinton, men sambært Vinnuhúsinum verður tað antin í august ella oktober.



*Trý tíðindafólk frá altjóða tíðindastovuni, Assosiated Press, vitjaðu í Miðlahúsinum í gjár. Tann fjórði á myndini er Jógvan Tróndarson, ið hevur siglt sum skipari í Grønlandi í 20 ár. Hann greiddi tíðindafólkunum frá teimum veðurlagsbroytingum, hann hevur upplivað í Grønlandi hesi árini*

*Mynd: Jan Müller*